Kommunufelagið

Dagfesting
13. februar 2023

Fíggjarmálaráðið
Tinganes
Postrúm 2039
100 Tórshavn

Málsviðgeri
Janus Haraldsen

Tygara j.nr.
21/07135

Viðv.: U.t.ll. um almenna talgilda postskipan

Fíggjarmálaráðið sendi 16. januar 2023 omanfyrinevnda uppskot til ummælis. Kommunufelagið hevur viðgjørt uppskotið og hevur nakrar viðmerkingar. Leggið í hesum sambandi til merkis, at tað ikki hevur verið okkum gjørligt at viðgera málið politiskt á regluligum stýrisfundi í felagnum.

Kommunur eru ikki almennir stovnar.
Lógaruppskotið leggur seg millum annað eftir at regulera, hvussu "*almennir stovnar*" leggja síni viðurskifti til rættis. Burturúr viðmerkingunum ber helst óbeinleiðis til at staðfesta, at hetta heitið eisini fevnir um kommununrnar. Hetta er somuleiðis fatanin, sum felagið hevur fingið í samskifti við Fíggjarmálaráðið. Ynskiligt hevði kortini verið, um tað varð skilmarkað meiri beinleiðis í lógaruppskotinum, at kommunur verða fevndar av lógini.

Í framhaldi av hesum skal viðmerkjast, at tað eftir okkara tykki kann føra til misskiljingar at umrøða kommunur sum "*almennir stovnar*". Málsliga knýtir orðingin seg til eindir undir landsstýrinum, sum kommununrnar skipanarliga ikki eru partar av. Einstøku kommununrnar hava heldur ikki stovnar undir sær, tí kommununan sum kunnugt er at meta sum eindarfyrisiting. Stovns-heitið verður sostatt ikki brúkt sum løgfrøðilig skilmarking í ella av kommunala geiranum.

Mælast kann til í staðin at brúka orðingar úr fyristitingarlógini ("*allar partar av almennu fyrisitingini*") ella at nevna kommununrnar beinleiðis í lógartekstinum.

Krav um at brúka Mínboks
Lógaruppskotið leggur upp til, at talgilt samskifti frá almennu fyrisitingini framyvir skal fara til Mínboks, tá ið talan er um viðkvæmar persónsupplýsingar ella trúnaðarupplýsingar.
Talan er um eitt nýtt krav, sum ætlandi skal setast í verk eftir skiftistíð til teirra, sum enn vanta at knýta seg í Mínboks. Onki verður tó sagt um, hvussu long hendan skiftistíðin verður og hvussu hon ætlandi skal leggjast til rættis.

Kommununrnar – eisini tær, sum longu eru knýttar Mínboks – hava sjálvsagt tørv at fáa stundir at gjøgnumganga útfarandi samskifti teirra og leggja hesa umlegging til rættis. Mælt verður tí

Kommunufelagið

til at rúm tíð verður sett av saman við kommununum, Talgildu Føroyum, veitarum o.ø. at tryggja eina góða verkseting av hesum nýggja kravi.

Í sama viðfangi kann eisini vera tørvur á einum meiri yvirskipaðum kjaki millum land og kommunur um, hvussu talgildingin av Føroyum skal mennast og fíggjast frameftir. Kommunurnar hava nógv beinleiðis samskifti við borgarar, og tað er tí av stórum týdningi at tær verða hoyrdar, og at tær kunnu vera við til at raðfesta og at leggja til rættis.

Slag av upplýsingum

Lógaruppskotið umrøður nøkur sløg av upplýsingum, sum framyvir bert kunnu sendast talgilt umvegis Mínboks. Talan er um eina yvirskipaða lýsing, og tað er væntandi at fleiri ítøkilig ivamál fara at standast av lógini.

Sum dømi koma kommunurnar helst at skula taka støðu til, um upplýsingar um P-tal, aldur, kontonummar, bústað, telefonnummar, teldupostadressu, hjúnastøðu, nøvn á børnum og so framvegis, eru av slíkum slagi, at teir kunnu væntast at verða hildnir í trúnaði.

Somuleiðis kunnu ivamál stinga seg upp um tey sløg av málum, sum kommunur, eldrasamstørv, barnaverndir o.o. hava til viðgerar. Er tað ein trúnaðarupplýsingur, at eitt mál er til viðgerðar, og er munur á alt eftir, hvat mál talan er um? Eru allar fyrisitingarligar avgerðir fevndar – eisini tær har til ber at geva fult alment innlit í málið?

Hetta eru ivamál, sum viðmerkingarnar í størri mun eiga at fyrireika kommunurnar til at kunna taka støðu til.

Slag av samskifti

At enda kann viðmerkjast, at okkara fatan av lógaruppskotinum er, at tað einans fevnir um útfarandi, talgilt samskifti sum inniheldur ávísar upplýsingar. Vit skilja hetta soleiðis, at ætlanin ikki er at regulera talgilda móttøku av hesum upplýsingum, og at kommunur sostatt framvegis kunnu móttaka upplýsingar umvegis teldupost, sms og aðrar talgildar miðlar.

Ynskiligt var, um greið støða var tikin til hetta í viðmerkingunum til uppskotið.

Vegna
Kommunufelagið

Tórbjørn Jacobsen
formaður

Eyðun Christiansen
stjóri